Januar
LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI

# Roknskapargreining fyri mjólkarvinnuna

## 2009 – 2015
## (2009/10 – 2015/16)

mars 2017

**INNIHALDSYVIRLIT**


**Frágreiðing** .......... 3

**Yvirlit yvir feløg, sum eru við í greiningini** .......... 5

**Rakstrarroknskapirnir 2009 – 2015 (2009/10 – 2015/16)** .......... 6

**Fíggjarstøðurnar við roknskaparársenda (31/12 og 30/6)** .......... 10

**Frágreiðing**

Í greiningini hava vit valt at hyggja at almennu ársroknskapunum hjá 23 smápartafeløgum, sum hava verið virkin øll 7 árini, sum greiningin fevnir um. Tað eru tó nøkur feløg, sum eru í holt við at umleggja virksemið, har tað sæst aftur, at raksturin er munandi broyttur. Hjá onkrum eru nógvar niðurskrivingar rakstrarførdar, meðan tað hjá onkrum øðrum eru stórar inntøkuføringar. Hesar umleggingar kunnu ávirka meðaltølini nakað.

Samanlagt hava hesir 23 mjólkarbøndurnir latið MBM umleið 80% av samlaðu innvigaðu mjólkarnøgdini.

Í almennu ársroknskapunum eru ikki serliga nógvar upplýsingar, men tær vísa, hvussu raksturin í høvuðsheitum hevur hilnast tey einstøku árini, og hvussu rákið í vinnuni er. Sum í øðrum vinnum eru tað nakrir mjólkarbøndur, ið klára seg væl, meðan tað hjá øðrum ikki gongur so væl.

Í greiningini framgongur, at frá 2009 til 2011 versnaðu rakstrarúrslitini, men í 2012 og í 2013 vendi gongdin. Í 2014 er samlaða úrslitið lækkað munandi. Fyri árini 2012 -2017 varður ein serstakur stráfóðurstuðul latin landbúnaðarvinnuni. Tilsamans eru 24,0 mió.kr. játtaðar yvir 6 ár. Fyri at hesin stuðulin kann vera ein varandi hjálp hjá vinnuni er neyðugt, at ein partur verður brúktur at velta fyri. Men um tað skal muna nakað, skulu 500 hektarar veltast afturat sbr. Búnaðarstovuni. Við verandi veltistuðulsskipanini, sum er 10 kr./fm, skulu 50 mió.kr. gjaldast í veltistuðli. Harafturat er neyðugt við uppdyrkingarvegum. Vanliga verður roknað við umleið 200 metrum fyri hvønn hektar. Tvs. at talan er um 10 km av uppdyrkingarvegi.

Hóast vinnan hevur fingið eyka veltistuðul, er samlaða úrslitið fyri øll 23 virkini bert omanfyri 4,0 mió.kr. í 2012 (2012/13) . Afturat mjólkarstuðlinum hava mjólkarbøndur fingið meiri fyri mjólkina í 2015. Tað sæst aftur hjá teimum, ið hava brotið roknskaparár. Harafturat er kraftfóðurprísurin lækkaður nakað, sum ein nærri greining fyri 11 mjólkarbøndur vísir.

Greiningin er fyrst og fremst gjørd til tey, ið starvast í hesi vinnuni, og annars tey, ið hava áhugamál í vinnuni. Tað eru ikki gjørdar djúptøknar útrokningar, sum møguligir peningastovnar og fíggjarfrøðingar gera, men tilfarið er tøkt, so hesir áhugabólkarnir kunnu gera sínar útrokningar.

Tað er onki at ivast í, at um mjólkarvinnan skal kunnu gerast effektiv, skal vinnan gerast nútíðarhóskandi. Tað merkir, at munandi íløgur skulu gerast í fjós, køstar o.t. Harafturat verður neyðugt at velta víðar víddir, fyri at fáa nóg mikið av stráfóðri, men eisini fyri at kunna gagnnýta tøðini best møguligt. Um hetta skal kunna gjøgnumførast er alneyðugt, at ein heilt klár politiskt kós verður sett, og at allar kreftir í landbúnaðinum fylkjast um settu kósina. Her verður hugsað bæði um teir almennu og teir privatu stovnarnar, so sum Búnaðarstovuna, Búnaðargrunnin, MBM og Bóndafelag Føroya.

Í aðrari greining, sum JANUAR hevur gjørt, við støði í 11 innanhýsis roknskapum, eru fleiri áhugaverdar upplýsingar, sum lýsa gongdina í mjólkarvinnuni nærri.

Tórshavn, tann 22. mars 2017

**P/F JANUAR**
løggilt grannskoðanarvirki

Jógvan Amonsson
statsaut. revisor

**Yvirlit yvir feløg, sum eru við í greiningini**

Í greiningini eru bert feløg tikin við, sum hava havt rakstur seinastu 7 árini. Niðanfyri framgongur hvørji feløg talan er um. Eisini sæst hvat roknskaparár feløgini brúka. Nøkur íognarfeløg eru í vinnuni, men í greiningini eru roknskapirnir hjá íognarunum brúktir, tí ikki allir roknskapirnir hjá íognarfeløgunum eru tøkir.

| | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Tal á roknskapum | 23 | 23 | 23 | 23 | 23 | 23 | 23 |

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Beitisgarður | X | X | X | X | X | X | X |
| Drívá | X | X | X | X | X | X | X |
| Garðurin í Búðini | X | X | X | X | X | X | X |
| Hoyvíksgarður | X | X | X | X | X | X | X |
| Miðstovugarðurin | X | X | X | X | X | X | X |
| MS Landbúnaður | X | X | X | X | X | X | X |
| Heimistova | X | X | X | X | X | X | X |
| Í Grønunum | X | X | X | X | X | X | X |
| Ólavur Andreasen | X | X | X | X | X | X | X |
| Sólgarðar | X | X | X | X | X | X | X |
| ROJH | X | X | X | X | X | X | X |
| Oyrareingjagarður | X | X | X | X | X | X | X |
| Varmakelda | X | X | X | X | X | X | X |
| Uttastovugarðurin | X | X | X | X | X | X | X |
| | | | | | | | |
| | 2009/10 | 2010/11 | 2011/12 | 2012/13 | 2013/14 | 2014/15 | 2015/16 |
| Fríðdalur | X | X | X | X | X | X | X |
| Hamarsgarður | X | X | X | X | X | X | X |
| Hvíthjallar | X | X | X | X | X | X | X |
| Húsgarður | X | X | X | X | X | X | X |
| Klettagarður | X | X | X | X | X | X | X |
| Müllersgarður | X | X | X | X | X | X | X |
| Tinggarðurin | X | X | X | X | X | X | X |
| á Steinum | X | X | X | X | X | X | X |
| Torvlaðgarðurin | X | X | X | X | X | X | X |

## Rakstrarroknskapirnir 2009 – 2015 (2009/10 – 2015/16)

Niðanfyri standandi talva vísir rakstrarroknskapirnar tilsamans hjá hesum 23 feløgunum í 1.000 kr.

**Tilsamans fyri 23 ársroknskapir**

| | 2009/10 og 2009 | 2010/11 og 2010 | 2011/12 og 2011 | 2012/13 og 2012 | 2013/14 og 2013 | 2014/15 og 2014 | 2015/16 og 2015 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Bruttoúrslit | 10.087 | 9.858 | 9.467 | 9.769 | 15.344 | 13.616 | 14.914 |
| Starvsfólkakostnaður | -3.780 | -3.574 | -4.208 | -4.194 | -3.921 | -5.127 | -6.454 |
| Avskrivingar | -2.507 | -2.306 | -2.417 | -5.483 | -4.974 | -6.187 | -5.079 |
| **Rakstrarúrslit** | **3.801** | **3.977** | **2.842** | **92** | **6.449** | **2.302** | **3.381** |
| Inntøka frá kapitalpørtum í dóttirfeløgum | 570 | -46 | -290 | 827 | 870 | 335 | 538 |
| Fíggjarligar inntøkur | 76 | 48 | 67 | 2.005 | 20 | 12 | 1.258 |
| Fíggjarligir kostnaðir | -1.559 | -1.525 | -1.557 | -1.709 | -1.501 | -1.454 | -1.248 |
| **Úrslit áðrenn skatt** | **2.887** | **2.455** | **1.061** | **1.216** | **5.837** | **1.195** | **3.929** |
| Skattur | -305 | -505 | -149 | -138 | -1.065 | -280 | -752 |
| **Ársúrslit** | **2.582** | **1.950** | **912** | **1.077** | **4.772** | **915** | **3.177** |

Um omanfyri standandi roknskapir verða umarbeiddir eitt sindur sæst, at avlopið til fíggjarkostnað (rentur og avskrivingar) og skatt, tað sokallaða EBITDA, er sum niðanfyri víst:

| | 2009/10 og 2009 | 2010/11 og 2010 | 2011/12 og 2011 | 2012/13 og 2012 | 2013/14 og 2013 | 2014/15 og 2014 | 2015/16 og 2015 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| EBITDA | 6.307 | 6.284 | 5.258 | 5.575 | 11.422 | 8.489 | 8.460 |
| Hægsta EBITDA | 875 | 779 | 800 | 972 | 1.630 | 1.025 | 1.041 |
| Lægsta EBITDA | -78 | 28 | -16 | -109 | 32 | -17 | -83 |

Sum tað klárt framgongur, so vóru úrslitini lækkandi fram til 2011 (2011/12), men hækkaði síðani aftur, fyri síðani at lækka nógv í 2014 til tað sama sum í 2011. Í 2015 gjørdist úrslitið aftur betur, hóast tað eru 8 roknskapir, ið hava hall. Tað sæst, at bruttoúrslitið er hækkað aftur í 2015, og starvsfólkakostnaðurin er hækkaður, meðan avskrivingarnar eru lækkaðar nakað.

Nevnast skal, at seinastu 4 árini er eyka stráfóðurstuðul latin bóndunum. Hesin eyka stráfóðurstuðulin er játtaður fram til 2017. Tilsamans verða 24,0 mió.kr. goldnar úr Búnaðargrunninum til henda stuðulin. Hesin stuðulin er ikki treytaður av nøkrum. Sum støðan er í vinnuni, eru tað sbr. Búnaðarstovuni, neyðugt at nýta stórar upphæddir at velta meiri bø fyri, tí nógvar mjólkarkvotur eru seldar seinastu árini. Hetta førir so við sær, at tann gamli bøurin, har mjólkarkvotan var, nú liggur óvirkin, meðan keypararnir ikki hava velt nóg mikið, tí er neyðugt hjá nógvum mjólkarbøndum at keypa hoyggj úr útheiminum, serliga úr Danmark og Íslandi. Búnaðarstovan mælir til, at einir 500 hektarar verða veltir afturat. Higartil eru ikki nógv kúfóður velt

síðani eyka stráfóðurstuðulin varð innførdur. Henda støðan varð eisini umrødd á landbúnaðarstevnuni fyrr í ár, sum varð í Klaksvík.

Tey seinastu árini eru nógvar broytingar hendar í mjólkarvinnuni. Talið á mjólkarbóndum er lækkað munandi. Seinastu 7 árini, sum henda greiningin fevnir um, eru eisini nakrar broytingar farnar fram. Hetta sæst serstakliga, tá hugt verður at hægsta og lægsta EBITDA. Tað eru mjólkarbøndur, sum hava umlagt raksturin munandi. Tað eru framvegis rembingar í mjólkarvinnuni, so tað er ikki óhugsandi, at tann gongdin, sum hevur verið, har fjósini gerast størri og størri, fer at halda fram.

Niðanfyri eru bestu og vánaligastu ársúrslitini fyri tíðarskeiðið víst:

| | 2009/10 og 2009 | 2010/11 og 2010 | 2011/12 og 2011 | 2012/13 og 2012 | 2013/14 og 2013 | 2014/15 og 2014 | 2015/16 og 2015 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Hægsta ársúrslit | 637 | 482 | 504 | 668 | 1.153 | 318 | 1.519 |
| Lægst úrslit | -165 | -289 | -511 | -862 | -177 | -811 | -649 |

Bæði tey vánaligastu úrslitini í 2012, 2014 og í 2015 og eisini tey bestu úrslitini í 2013 og 2015 koma av serstøkum viðurskiftum.

Niðanfyri eru meðalúrslitini fyri hvønn mjólkarbónda.

| | 2009/10 og 2009 | 2010/11 og 2010 | 2011/12 og 2011 | 2012/13 og 2012 | 2013/14 og 2013 | 2014/15 og 2014 | 2015/16 og 2015 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Bruttoúrslit | 439 | 429 | 412 | 425 | 667 | 592 | 648 |
| Starvsfólkakostnaður | -164 | -155 | -183 | -182 | -170 | -223 | -281 |
| Avskrivingar | -109 | -100 | -105 | -238 | -216 | -269 | -221 |
| **Rakstrarúrslit** | **165** | **173** | **124** | **4** | **280** | **100** | **147** |
| Inntøka frá kapitalpørtum í dótturf. | 25 | -2 | -13 | 36 | 38 | 15 | 23 |
| Fíggjarligar inntøkur | 3 | 2 | 3 | 87 | 1 | 1 | 55 |
| Fíggjarligir kostnaðir | -68 | -66 | -68 | -74 | -65 | -63 | -54 |
| **Úrslit áðrenn skatt** | **126** | **107** | **46** | **53** | **254** | **52** | **171** |
| Skattur | -13 | -22 | -6 | -6 | -46 | -12 | -33 |
| | | | | | | | 0 |
| **Ársúrslit** | **112** | **85** | **40** | **47** | **207** | **40** | **138** |

Sum tað týðiliga framgongur, so lækkaði meðalúrslitið fram til 2011, øktist nakað í 2012 og øktist nógv í 2013, men er so fallið aftur í 2014, fyri aftur at økjast í 2015. Sum tað sæst, so er starvsfólkakostnaðurin, tvs. lønir og lønargjøld, millum kr. 12.500 og kr. 15.000 um mánaðin fram til 2013, men er hækkað í 2014 til kr. 19.000 um mánaðin, og í 2015 til kr. 23.400 um mánaðin. Tað er ein sera lágur starvsfólkakostnaður. Á einum mjólkarfjósi krevst vanliga meiri enn eitt ársverk.

Niðanfyri sæst hvussu nógv meðalgarðurin hevur eftir til fíggjarkostnað tey einstøku árini. Eisini sæst, hvussu nógv tann besti garðurin hevur til fíggjarkostnað í teimum einstøku árunum, og hvussu nógv tann vánaligasti garðurin hevur til fíggjarkostnað. Nevnast skal, at tað ikki er tann sami garðurin, sum hevur tað frægasta úrslitið á hvørjum ári. Og heldur ikki er tað sami garður, sum er vánaligastur øll árini.

| | 2009/10 og 2009 | 2010/11 og 2010 | 2011/12 og 2011 | 2012/13 og 2012 | 2013/14 og 2013 | 2014/15 og 2014 | 2015/16 og 2015 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| EBITDA | 274 | 273 | 229 | 242 | 497 | 369 | 368 |
| Hægsta EBITDA | 875 | 779 | 800 | 972 | 1.630 | 1.025 | 1.041 |
| Lægsta EBITDA | -78 | 28 | -16 | -109 | 32 | -17 | -83 |

Sum tað sæst frammanfyri, so er samlaða úrslitið munandi hækkað, hóast starvsfólkakostnaðurin hevur verið hægri. Men hóast vinnan hevurð fingið 4,0 mió.kr. í stráðfóðurstuðli, so er samlaða úrslitið lægri enn tað. Samlaða úrslitið hjá hesum 23 mjólkarbøndunum var 3,2 mió.kr. í 2015.

Hóast samlaða úrslitið hjá hesum 23 mjólkarbóndunum er økt munandi, so er rakstrarúrslitið lækkað hjá 12 teirra. Eyka stráfóðurstuðul er útgoldin upp á tilsamans 4,0 mió.kr., sum er hægri enn samalað úrslitið hjá hesum 23 mjólkarbóndunum.

Meðalprísurin á mjólkini er hækkaður nakað, samstundis sum kraftfóðurprísurin pr. litur mjólk í meðal er lækkaður. Hesar báðar broytingarnar hava tilsamans økt inntøkuna hjá meðalbóndanum í 2015 við 0,39 kr./l. Hesar upplýsingarnar eru frá eini neyvari greining, ið JANUAR hevur gjørt fyri 11 mjólkarbøndur. Hóast væntandi varð, at úrslitini hjá mjólkarbøndunum fóru at batna av stráfóðurstuðlinum, so er tað ikki hent.

Í stabbamyndini niðanfyri sæst, hvussu kostnaðirnir hava verið seinastu árini. Samlaði stabbin vísir samlaða bruttoúrslitið hjá meðalgarðinum. Tað sæst týðiliga, at samlaða bruttoúrslitið hækkaði árini 2011 – 2013, men lækkaði aftur í 2014, fyri síðani at hækka aftur í 2015. Hetta kemst serliga av eyka stráfóðurstuðlinum, og at mjólkarprísurin er hækkaður nakað í 2015, samstundis sum fóðurkostnaðurin er lækkaður. Men mjólkarprísurin frá MBM er hækkaður eitt lítið sindur.

Eisini sæst, at avskrivingarnar eru lækkaðar í 2015. Tað er serliga mjólkarkvoturnar, ið eru niður- og avskrivaðar. Einstakar niðurskrivingar eru gjørdar beinleiðis yvir eginognina og síggjast tí ikki í rakstrinum.


Stabbin vísir bruttoúrslitið og aðrar inntøkur fyri meðalgarðin
800.000
600.000
400.000
200.000
0
2009
2010
2011
2012
2013
2014
2015
Ársúrslit
Starvsfólkakostnaður
Avskrivingar
Fíggjarligur
Skattur

## Fíggjarstøðurnar við roknskaparársenda (31/12 og 30/6)

Niðanfyri eru ognirnar vístar fyri hesar 23 mjólkarbøndurnar samanlagt.

| OGN | 2009/10 og 2009 | 2010/11 og 2010 | 2011/12 og 2011 | 2012/13 og 2012 | 2013/14 og 2013 | 2014/15 og 2014 | 2015/16 og 2015 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Mjólkarkvotur | 47.025 | 42.475 | 43.182 | 41.058 | 37.762 | 33.604 | 28.943 |
| Good-will | 0 | 0 | 0 | 2.500 | 2.500 | 2.500 | 2.500 |
| **Immateriell støðisogn** | **47.025** | **42.475** | **43.182** | **43.558** | **40.262** | **36.104** | **31.443** |
| | | | | | | | |
| Bygningar | 1.969 | 1.833 | 1.544 | 1.707 | 2.110 | 2.418 | 2.308 |
| Rakstrargøgn | 9.943 | 10.282 | 11.347 | 10.935 | 10.982 | 11.678 | 14.338 |
| Kríatúr | 3.666 | 3.864 | 3.954 | 3.869 | 4.094 | 4.111 | 4.086 |
| **Materiell støðisogn** | **15.579** | **15.978** | **16.845** | **16.511** | **17.186** | **18.207** | **20.733** |
| | | | | | | | |
| Kapitalpartar | 179 | 688 | 847 | 820 | 1.421 | 1.301 | 396 |
| Onnur virðisbrøv | 34 | 31 | 34 | 34 | 31 | 30 | 300 |
| Egin partabrøv | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **Fíggjarlig støðisogn** | **213** | **719** | **881** | **854** | **1.452** | **1.331** | **696** |
| | | | | | | | |
| **Støðisogn tilsamans** | **62.817** | **59.173** | **60.908** | **60.922** | **58.899** | **55.641** | **52.872** |
| | | | | | | | |
| Rávørur og hjálpitilfar | 22 | 28 | 26 | 25 | 20 | 121 | 121 |
| Vøru- og tænastuogn | 2.749 | 2.427 | 2.005 | 2.872 | 3.069 | 2.785 | 2.736 |
| Áogn hjá atknýttum feløgum | 872 | 3.651 | 3.516 | 947 | 468 | 642 | 1.231 |
| Virðisbrøv | 7 | 6 | 4 | 4 | 7 | 6 | 7 |
| Tíðaravmarkingar | 211 | 90 | 54 | 362 | 28 | 29 | 27 |
| Onnur áogn | 2.325 | 2.504 | 2.471 | 2.310 | 2.123 | 2.578 | 1.954 |
| **Áogn tilsamans** | **6.186** | **8.705** | **8.077** | **6.520** | **5.715** | **6.161** | **6.076** |
| | | | | | | | |
| Peningur | 1.240 | 1.896 | 1.601 | 2.235 | 5.087 | 4.318 | 5.885 |
| | | | | | | | |
| **Ogn í umferð tilsamans** | **7.426** | **10.601** | **9.678** | **8.755** | **10.802** | **10.479** | **11.961** |
| | | | | | | | |
| **OGN TILSAMANS** | **70.243** | **69.774** | **70.586** | **69.677** | **69.701** | **66.120** | **64.833** |

Her sæst, at mjólkarkvoturnar hjá hesum mjólkarbøndunum eru lækkaðar við góðum 18 mió.kr. hesi 7 árini. Ein partur av frágreiðingini er, at nakrir bøndur hava selt mjólkarkvotuna, tí teir eru um at gevast í vinnuni. Í nøkrum førum eru mjólkarkvoturnar seldar fyri eina lægri upphædd, enn tær vórðu keyptar fyri. Ein onnur frágreiðing er, at nakrar mjólkarkvotur eru niður- og/ella avskrivaðar. Hóast tað, so er samlaða virðið á mjólkarkvotunum góð 54% av samlaðu støðisognini.

Íløgurnar í fastogn og rakstrartól hava verið sera lítlar hesi árini. Men nakrar íløgur eru gjørdar í 2014 í rakstrartól.

Ognin hjá meðalmjólkarfjósinum er henda:

| OGN | 2009/10 og 2009 | 2010/11 og 2010 | 2011/12 og 2011 | 2012/13 og 2012 | 2013/14 og 2013 | 2014/15 og 2014 | 2015/16 og 2015 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Mjólkarkvotur | 2.045 | 1.847 | 1.877 | 1.785 | 1.642 | 1.461 | 1.258 |
| Good-will | 0 | 0 | 0 | 109 | 109 | 109 | 109 |
| **Immateriell støðisogn** | **2.045** | **1.847** | **1.877** | **1.894** | **1.751** | **1.570** | **1.367** |
| | | | | | | | |
| Bygningar | 86 | 80 | 67 | 74 | 92 | 105 | 100 |
| Rakstrargøgn | 432 | 447 | 493 | 475 | 477 | 508 | 623 |
| Kríatúr | 159 | 168 | 172 | 168 | 178 | 179 | 178 |
| **Materiell støðisogn** | **677** | **695** | **732** | **718** | **747** | **792** | **901** |
| | | | | | | | |
| Kapitalpartar | 8 | 30 | 37 | 36 | 62 | 57 | 17 |
| Onnur virðisbrøv | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 13 |
| Egin partabrøv | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **Fíggjarlig støðisogn** | **9** | **31** | **38** | **37** | **63** | **58** | **30** |
| | | | | | | | |
| **Støðisogn tilsamans** | **2.731** | **2.573** | **2.648** | **2.649** | **2.561** | **2.419** | **2.299** |
| | | | | | | | |
| Rávørur og hjálpitilfar | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 5 | 5 |
| Vøru- og tænastuogn | 120 | 106 | 87 | 125 | 133 | 121 | 119 |
| Áogn hjá atknýttum feløgum | 38 | 159 | 153 | 41 | 20 | 28 | 54 |
| Virðisbrøv | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Tíðaravmarkingar | 9 | 4 | 2 | 16 | 1 | 1 | 1 |
| Onnur áogn | 101 | 109 | 107 | 100 | 92 | 112 | 85 |
| **Áogn tilsamans** | **269** | **378** | **351** | **283** | **248** | **268** | **264** |
| | | | | | | | |
| Peningur | 54 | 82 | 70 | 97 | 221 | 188 | 256 |
| | | | | | | | |
| **Ogn í umferð tilsamans** | **323** | **461** | **421** | **381** | **470** | **456** | **520** |
| | | | | | | | |
| **OGN TILSAMANS** | **3.054** | **3.034** | **3.069** | **3.029** | **3.030** | **2.875** | **2.819** |



Tað framgongur týðiliga, at tann immateriella ognin (mjólkarkvotan) er lækkað (tann blái parturin av stabbanum) seinastu árini, meðan íløgan í maskinur og tól er støðug. Ognin í umferð (tann guli parturin av stabbanum), tvs útistandandi hjá viðskiftafólki og innistandandi peningur í peningastovnum er hækkað nakað. Tann samlaða ognin er tó lækkandi.

Skyldurnar hjá hesum 23 mjólkarbøndunum eru vístar niðanfyri:

| SKYLDUR | 2009/10 og 2009 | 2010/11 og 2010 | 2011/12 og 2011 | 2012/13 og 2012 | 2013/14 og 2013 | 2014/15 og 2014 | 2015/16 og 2015 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Partapeningur | 1.885 | 1.885 | 1.885 | 1.885 | 1.885 | 1.885 | 1.885 |
| Uppskrivingargrunnar | 83 | 83 | 83 | 92 | 92 | 92 | 92 |
| Flutt úrslit | 10.708 | 13.285 | 14.985 | 14.566 | 18.294 | 19.290 | 21.244 |
| **Eginogn tilsamans** | **12.676** | **15.253** | **16.953** | **16.543** | **20.271** | **21.267** | **23.222** |
| | | | | | | | |
| Útsettur skattur | 1.634 | 1.901 | 1.983 | 2.099 | 2.786 | 2.883 | 3.148 |
| Aðrar avsetingar | 1.431 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **Avsetingar tilsamans** | **3.065** | **1.901** | **1.983** | **2.099** | **2.786** | **2.883** | **3.148** |
| | | | | | | | |
| Langfreistað skuld | 14.201 | 12.759 | 13.788 | 13.877 | 13.956 | 13.803 | 12.192 |
| | | | | | | | |
| Stuttfreistað skuld | 2.991 | 2.479 | 2.439 | 5.213 | 3.885 | 2.547 | 2.900 |
| Bankaskuld | 581 | 1.073 | 1.082 | 1.162 | 928 | 277 | 146 |
| Vøru- og tænastuskuld | 3.449 | 4.976 | 4.343 | 5.217 | 4.724 | 4.801 | 4.649 |
| | | | | | | | |
| Skuld til atknýtt feløg/nærstandandi | 28.669 | 26.839 | 25.174 | 21.513 | 19.049 | 15.899 | 15.652 |
| Partafelagsskattur | 242 | 218 | 225 | 164 | 332 | 455 | 414 |
| Tíðaravmarkingar | 251 | 0 | 0 | 0 | 0 | 38 | 413 |
| Onnur skuld | 4.118 | 4.276 | 4.601 | 3.890 | 3.769 | 4.152 | 2.097 |
| Stuttfreistað skuld tilsamans | 40.301 | 39.861 | 37.863 | 37.159 | 32.688 | 28.167 | 26.271 |
| | | | | | | | |
| **Skuld tilsamans** | **54.502** | **52.620** | **51.651** | **51.035** | **46.644** | **41.970** | **38.464** |
| | | | | | | | |
| **SKYLDUR TILSAMANS** | **70.243** | **69.774** | **70.586** | **69.677** | **69.701** | **66.120** | **64.833** |

Trygdarleikastigið, sum sigur frá hvussu stóran part eginognin fíggjar av samlaðu ognini hjá hesum mjólkarbøndunum hesi árini, er:

| | 2009/10 og 2009 | 2010/11 og 2010 | 2011/12 og 2011 | 2012/13 og 2012 | 2013/14 og 2013 | 2014/15 og 2014 | 2015/16 og 2015 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Trygdarleikastig | 18,0% | 21,9% | 24,0% | 23,7% | 29,1% | 32,2% | 35,8% |

Eginognin er økt samstundis, sum bæði tann langfreistaða og tann stuttfreistaða skuldin eru lækkaðar, og tí er trygdarleikastigið hækkað.

Men verður hugt nærri at roknskaparpostinum "Skuld til atknýtt feløg/nærstandandi" sæst, at tað serliga er henda skuldin, ið er lækkað. Í hesi skuldini er millumrokningin, sum mjólkarbøndurnir fingu við felagið, tá mjólkarkvotan varð seld. Hjá teimum flestu var hetta áðrenn 1/1-2007. Um lækkingin verður samanhildin við "Starvsfólkakostnaðin", er tað nakað, sum bendir á, at bøndurnir

Iutvíst hava livað av millumrokningini, heldur enn at fáa sær løn. Tí eru rakstrarroknskapirnir betri enn teir áttu at verið, um øll arbeiðsmegin varð lønt. Hjá nøkrum mjólkarbøndum sæst, at hesar millumrokningarnar skjótt eru brúktar. Tað fer at merkja, at í framtíðini mugu bøndurnir eisini fáa løn frá feløgunum.

Myndin er greiðari niðanfyri, har skuldin hjá meðalmjólkarbóndanum er víst:

| SKYLDUR | 2009/10 og 2009 | 2010/11 og 2010 | 2011/12 og 2011 | 2012/13 og 2012 | 2013/14 og 2013 | 2014/15 og 2014 | 2015/16 og 2015 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Partapeningur | 82 | 82 | 82 | 82 | 82 | 82 | 82 |
| Uppskrivingargrunnar | 4 | 4 | 4 | 4 | 4 | 4 | 4 |
| Flutt úrslit | 466 | 578 | 652 | 633 | 795 | 839 | 924 |
| **Eginogn tilsamans** | **551** | **663** | **737** | **719** | **881** | **925** | **1.010** |
| | | | | | | | |
| Útsettur skattur | 71 | 83 | 86 | 91 | 121 | 125 | 137 |
| Aðrar avsetingar | 62 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **Avsetingar tilsamans** | **133** | **83** | **86** | **91** | **121** | **125** | **137** |
| | | | | | | | |
| Langfreistað skuld | 617 | 555 | 599 | 603 | 607 | 600 | 530 |
| | | | | | | | |
| Stuttfreistað skuld | 130 | 108 | 106 | 227 | 169 | 111 | 126 |
| Bankaskuld | 25 | 47 | 47 | 51 | 40 | 12 | 6 |
| Vøru- og tænastuskuld | 150 | 216 | 189 | 227 | 205 | 209 | 202 |
| Skuld til atknýtt feløg/nærstandandi | 1.246 | 1.167 | 1.095 | 935 | 828 | 691 | 681 |
| Partafelagsskattur | 11 | 9 | 10 | 7 | 14 | 20 | 18 |
| Tíðaravmarkingar | 11 | 0 | 0 | 0 | 0 | 2 | 18 |
| Onnur skuld | 179 | 186 | 200 | 169 | 164 | 181 | 91 |
| Stuttfreistað skuld tilsamans | 1.752 | 1.733 | 1.646 | 1.616 | 1.421 | 1.225 | 1.142 |
| | | | | | | | |
| **Skuld tilsamans** | **2.370** | **2.288** | **2.246** | **2.219** | **2.028** | **1.825** | **1.672** |
| | | | | | | | |
| **SKYLDUR TILSAMANS** | **3.054** | **3.034** | **3.069** | **3.029** | **3.030** | **2.875** | **2.819** |



| | 2009/10 og 2009 | 2010/11 og 2010 | 2011/12 og 2011 | 2012/13 og 2012 | 2013/14 og 2013 | 2014/15 og 2014 | 2015/16 og 2015 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Eginogn | 551 | 663 | 737 | 719 | 881 | 925 | 1.010 |
| Millumrokning við nærstandandi | 1.246 | 1.167 | 1.095 | 935 | 828 | 691 | 681 |
| Ogn hjá bóndunum tilsamans | 1.798 | 1.830 | 1.832 | 1.655 | 1.710 | 1.616 | 1.690 |

Omanfyri er samlaði ágóðin hjá bóndunum í feløgunum. Her sæst, at eginognin og millumrokningin eru lækkað eitt sindur hesi árini. Tað merkir, at bøndurnir hava heldur hevað av millumrokningini enn at átgjalda sær løn. Sjálvsagt verður skatturin lægri, men uppsparingin verður spakuliga brúkt. So um nøkur ár mugu flest allir bøndurnir hækkað lønina, fyri at kunna hava somu eginnýtslu sum teir hava havt.